FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
The Faroe Islands Fisheries Inspection

FULLTRÚI TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Starv sum fulltrúi á Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

Á Fiskiveiðieftirlitinum arbeiða í løtuni 62 fólk, harav eru 46 við skipunum Brimli og Tjaldrinum.

Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur

- Dagligu ábyrgdina av eftirlitinum við føroyska fiskiskapinum í NEAFC, NAFO, og Grønlandi og málsviðgerð í hesum sambandi.
- Dagligu ábyrgdina við fiskiskapinum hjá lemmatrolarum, garnaskipum og smábátum.
- Dagligu ábyrgdina av fiskiveiðihagtølum
- Skipa fyri føroyska eftirlitinum í NEAFC og NAFO, samstarva um eftirlitsspurningar og luttaka á fundum hjá hesum felagsskapum.

Førleikakrøv:

- Hægstu nautisku útbúgving ella relevanta fiskivinnuútbúgving.
- Hava góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Hava góð samstarvsevni

Hollar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Setanartreytir

Lønar- og setanartreytirnar eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið

Starvsheitið er fulltrúi og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til deildarstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 311065 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra á Fiskiveiðieftirlitinum.

Umsóknir

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi **5. feb. 2007 kl. 12.00.**

Umsóknir skulu sendast til:

Fiskiveiðieftirlitið
Postsmoga 347
110 Tórshavn

www.fisk.fo

---

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum

Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um **1.februar**, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seainsta freist at søkja starvið er **22. januar 2007**, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

Sosialurin
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

---

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum

Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann, vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Tín høvuðsuppgáva verður dagliga framleiðslan av blaðnum, í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er **20. januar**, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
Marknaðardeildin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.